

**The Black & White Crew**
*Nýggjárskonsertin verður hildin á tveimum pallum. Hetta er gjørt soleiðis, at sleppast skal undan keðiligum steðgum, tá pallskifti er, í steðginum fer Hip Hop dansibólkurin The Black & White Crew at undirhalda á minna pallinum, meðan tónleikabólkarnir gera klárt á stóra pallinum.*
*Black & White Crew hevur gjørt vart við seg á Árins Songrødd, Summarfestivalinum og Náttin er Ung. Hetta eru tríggjar gentur, ið dáma at dansa og hava funnið saman og stovnað dansibólkin. Fer kom á dansibólkin, tá tær dansaðu á dansigólvinum á einum DJ tiltakið. Ein av fyrireikarunum sá tær og bjóðaði teimum upp á pallin at dansa, síðan tá hava tær ongantíð hugt afturum seg.*



**SIC**
*SIC er Føroya besti deyðmálmsbólkur. SIC vórðu nummar trý í The Global Battle Of The Bands herfyri, men tað skilst, at tað einans vóru nøkur fá stig millum SIC, Lama Sea og Marius, sum vann. SIC hevur nýliga verið á konsertferð í Íslandi og hevur verið sera virkin í heyst. Síðan SIC skiftið út í manningini í vár, er bólkurin vorðin alsamt betur, og eru nú ein sannur veggur av deyðsmálmi. Í Mikkjal Gaard Hansen hevur bólkurin ein tann sterkasta oddamannin í føroyskum tónleiki.*

# Í jólahýr við Frændum og Showmonnum

**Tað verður jóladansur við landsins bestu tónleikarum og lagsmiðum, tá Frændur og Showmenn fara á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 2. jólakvøld**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Allir gomlu slagararnir, fólkaognin, er á skránni, tá Frændur 2. jólakvøld fer á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Eisini fara Showmenn at spæla bæði við og uttan kendu klaksvíkingunum í Frændum.

**Væl blandað**

- Vit hava nógv tilfar at velja í og kunnu blanda kortini nokkso væl, so talan ikki verður um endurtøkur, sigur Steintór Rasmussen úr Frændum.

Frændur hava ikki verið so nógv á palli í ár, men høvdu framførslu í Danmark í summar og fyrst í desember vóru teir á palli á Eiði og beint nú er ikki so nógv annað á skránni, sigur Steintór.

Hesar framførslur hava eisini verið saman við Showmonnum og væl mannaði bólkurin er ein styrki fyri manningina í Frændum, sum harvið fáa eina munandi lættari uppgávu á palli og eisini uttanfyri pallin, tá showmenninir sjálvir standa í pall ljósinum.

Showmenn teljast millum fremstu bólkarnar í landinum og sterka manningin og teirra sterki kórpartur, setur bara eyka styrki á vælkendu Frændurslagararnar.

Showmenn hava eisini verið í eldinum undan jólum og hava eitt nýtt jólalag á skránni, sum hevur verið powerplay í ÚF í jólavikuni.

Tey sum hava fylgt við hava hoyrt eina komandi útgávu við Frændum, og gongst sum ætlað, er hetta ikki ómøguligt, sambært teimum sjálvum.

**Forsøla**

Tað er GÍ, sum skipar fyri stóra jóladansinum í Fuglafirði 2. jólakvøld. Aldursmarkið er 18 ár og er ætlanin at fáa tilkomnar lurtarar at hugna sær við vælkendum tónum frá Frændum og Showmonnum.

Fyrireikararnir vænta fult Mentanarhús verður fult 2. jólakvøld. Atgongumerkini fáast í forsølu fyri at sleppa undan longum bíðirøðum og útvið helmingurin av atgongumerkjunum er longu seldur.

